Bilarøð:

# Sum ein knívur í rygginum

**Havnin og vegurin, sum førir til Havnina um átta tíðina: Ein stórur ferðsluruðuleiki. Og teir stóru trailararnir gera ikki skilið betri. Í gjáramorgunin um 7.30 tíðina var ein lang røð av bilum í Kaldbaksbotni, og túrurin til Havnar tók nógv longri tíð enn vanligt. Ein trailari var fremstur í røðini**



*Hans Jákup Jacobsen er bilførari hjá Farmaleiðum. Í gjáramorgunin hevði hann eina langa bilarøð aftanfyri seg úr Kaldbaksbotni til Havnar, og sigur hann, at hetta kennist sum at hava ein knív í rygginum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Vit kenna tað øll. Klokkan nærkast átta, og klokkan átta eigur tú at vera til arbeiðis. Men tað er ikki altíð sum at siga tað, tá tú klokkan trý korter til átta kemur í eina bilrøð uppá eini 30 bilar. Vónirnar eru lítlar. Aftur ov seinur í dag.

Í gjáramorgunin var ein long bilarøð í Kaldbaksbotni. Tað vísti seg, at fleiri bilførarar kanska byrjaðu at verða eitt sindur illir inn á henda stóra trailaran frá Farmaleiðum, sum var fremstur í røðini. Vit prátaðu við Hans Jákup Jacobsen, bilføraran, sum hvønn morgun koyrir henda teinin.

–Í gjáramorgunin var serliga ringt, tí koyrilíkindini vóru so vánalig, sigur Hans Jákup Jacobsen. – Fyri tað fyrsta var ein bilur frammanfyri meg, sum koyrdi spakuligt, men eg kann ikki koyra ov skjótt, tá eg havi so nógva vekt aftanfyri meg. Ein trailari hevur eina last uppá eini 20 tons, so tað er ikki smávegis.

Hans Jákup sigur, at hann royndi at fáa bilarnar at yvirhála, men teir fyrstu bilarnir aftanfyri seg vóru ógvuliga trekir at fáa fram um.

–Tað var ræðuliga hált, og eg kendi, hvussu vognurin hevði hug at slingra eitt sindur, greiðir Hans Jákup frá. – Annars er tað politikkur hjá okkum trailaraførarum, at um vit koma í eina slíka støðu, so skulu vit lata bilarnar aftanfyri sleppa framvið.

Hvønn morgun koyrir Hans Jákup Jacobsen henda teinin. Hann kemur við trailaranum og lastini allan vegin vesturi úr Vágunum. Vanliga tekur túrurin úr Vestmanna eini trý korter, men í gjár tók hann nógv longur.

–Eg plagi at vera í Havn klokkan 7.30, men í gjár bar als onki til. Tað kennist sum at hava ein knív í rygginum, tá ein lang bilarøð er aftanfyri teg. Vanligar dagar komi eg ongantíð í eina slíka støðu, tí eg eri í Havnini so mikið tíðliga.

### Farið fyrr

Jógvan Johansen er koyrisamskipari hjá Farmaleiðum. Hann greiðir frá, at hvønn morgun um átta tíðina koma bilar av bygd til Havnar við last, og lasta bilin aftur.

–Vit noyðast at fáa bilarnar til Havnar so mikið tíðliga. Teir skulu fylla uppaftur í Havn, og síðani koyra vøruna út aftur á bygd, greiðir Jógvan Johansen frá. – Um hetta verður gjørt seinni, so verður nátt áðrenn bilførararnir vera lidnir.

Fólk verða ofta rættiliga ørg inn á hesar bilførararnar, tí tey skulu jú skunda sær til arbeiðis.

Vakthavandi á Politistøðini í Havn sigur, at trailaraførararnir skulu koyra eftir reglunum, og tað heldur hann eisini hesin bilførarin hevur gjørt.

–Bilførarin í gjár hevur kanska verið serliga ansin, tí tað var so hált, sigur vakthavandi. – Teir eiga sjálvandi at hava fyrilit fyri hinum akførunum, men teir eru jú eisini sum øll onnur. Teir vilja eisini sleppa fram.

Men vakthavandi á politistøðini heldur ikki, at trupulleikin liggur hjá trailaraførarunum. Hann heldur, at tað eru meira hini, ið skuldu farið fyrr frá húsum ístaðin fyri at altíð fara í síðstu løtu.

–Soleiðis er í Føroyum. Føroyingar eru ov seinir á sjóvarfallinum um morgnarnar, og tað er eisini tá tað ikki er hált. Ein bilførari eigur at rokna við onkrum trupulleikum og seinkingum, og tá farið verður so seint frá húsum, men tá teir fara so seint sum teir gera, so hava teir hug at argast inn á slíkar støður.




Caravanferð í Skotlandi

1 vika í Caravan í Nairn í apríl og mai 2002

Atlantic Airways Caravan í Nairn.
Vit hava tveir ekslusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar.
Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.



Nairn
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Moray-fjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.

8 persóns Caravan

| | |
|---|---|
| 2 vaksin og 3 børn | 8.400,- |
| 4 vaksin og 4 børn | 12.442,- |
| 8 vaksin fyri hvønn | 1.890,- |

6 persóns Caravan

| | |
|---|---|
| 2 vaksin og 2 børn | 7.350,- |
| 2 vaksin og 4 børn | 9.154,- |
| 6 vaksin fyri hvønn | 1.970,- |

Ferðaavgjald er íroknað prísin.

Flutningur til og frá flogvøllinum í Aberdeen er ikki íroknaður.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



STÓRT TILTAK Í ARGJA SKÚLA

Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00



Mattombola • Bommtombola
Café • Lutaseðlasøla
Klatriveggur • Skreiðirør
Fiskibrunnur • Karusell
Ponyríðing • Sodavatnssøla

5.b í Argja Skúla




Várframsýningin letur upp:

# Sakna breiðari úrval

**Leygardagin letur stóra várframsýningin upp í Listaskálanum í Havn, og hetta er ein stórhending hjá listafólki og –áhugaðum. Støðið er á leið tað saman sum undanfarin ár, men fyriskipararnir sakna fleiri listaverk at velja ímillum**



*Nevndin, ið hevur valt listaverkini til várframsýningina í ár, heldur, at fleiri listafólk kundu sent inn til framsýningina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Í morgin, leygardagin, klokkan 16 letur Listaframsýningin upp í Listaskálanum í Havn. Hetta er tólvta árið, at felagið Føroysk Myndlistafólk skipar fyri framsýningini, og í ár verða 86 listaverk, sum 27 ymisk listafólk hava gjørt, sýnd fram.

Listafólk senda síni listaverk inn til framsýningina, og síðani verða tey bestu vald út, og hesi koma við.

Listakvinnan Jóna Rasmussen er við í nevndini, ið hevur valt tey innkomnu listaverkini út. Amariel Norðoy og Tróndur Patursson hava eisini verið vrakarar til hesa framsýningina.

Hon sigur, at listafólk ikki hava sent eins nógv listaverk inn í ár sum undanfarin ár. Hetta heldur hon er harmiligt, tí vandi er fyri, at várframsýningin dettur niðurfyri, um undirtøkan millum listafólk ikki er nøktandi. Fleiri listafólk skuldu sent inn, so framsýningin hevði størri spenning og nýskapan.

Ein stórur helmingur av teimum listafólkum, ið senda listaverk til framsýningina, sleppa við.

### Sakna breiðari úrval

Nevdin saknar eitt breiðari úrval av listaverkum at velja og vraka ímillum. Fleiri av teimum garvaðu listafólkunum kundu væl havt sent solidari listaverk inn til framsýningina, so hon hevði størri vekt, heldur Jóna.

Hon leggur afturat, at okkurt nýtt og spennandi er eisini við í ár. Nevnast kann ein video-uppseting hjá Tóroddi Poulsen og ein teldumynd hjá Inga Joensen, sum allatíðina skiftir lit.

Nakrir útlendingar eru við í ár, sum hava spennandi grafisk verk at sýna fram. Nevnast kann Vitautas Narbutas úr Litava, ið býr í Íslandi, og sum er við fyri fyrstu ferð. Annars eru fleiri av teimum garvaðu føroysku listafólkunum so sum Tróndur Patursson, Kári Svensson, Olivur við Neyst og Bárður Jákupsson við aftur í ár.

Hetta er eitt tað størsta tiltakið í árinum hjá føroyskum myndlistafólki og áhugaðum. Limir í Aldubáruni fara at spæla, tá framsýningin letur upp.

# Páskabryggj á gøtuni

**Nýggju eigararnir av Restorff´s bjóðaðu mikudagin fólki at smakka nýggja páskabryggið hjá bryggjaríinum, og kokkarnir róstu nýggju blandingini**



*Restorff´s bjóðaði mikudagin fólki at smakka nýggja páskabryggið, og kokkarnir hildu, at hetta var ein góð øl*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

PÁSKABRYGGJ
*Stefan í Skorini*

So var nýggja páskabryggið hjá Restorff´s á gøtuni, eina viku seinni enn kappingarneytin Føroya Bjór. Nógv fólk varð boðið at smakka nýggja bjórið, sum er ein spildurnýggj blanding.

At døma um smakkin vóru nakrir kokkar komnir á gátt. Íslendingurin Guðmundur Guðmundsson var bilsin av nýggju ølini og helt, at hon var avbera góð.

–Hon hevur ein góðan smakk. Hon er livandi, tí hon skúmar leingi og doyr ikki, sum aðrar øl ofta gera, sigur hann.

Kokkurin metir, at hetta nýggja slagið er væl egnað afturvið mati, ið er sterkt kryddaður.

Hann heldur, at hetta páskabryggið er betri enn danskt páskabryggj, tí styrkin er betri. Hendan er ikki so søt sum tær donsku, ið mangan hava ov søtan smakk.

Eigararnir eru eisini nøgdir við nýggju blandingina, sum teir halda hevur ein einfaldan men tjúkkan smakk.

Narkomálið:

# Dani fingið longda fongsling

NARKOMÁLIÐ
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur longdi mikudagin varðhaldsfongslingina hjá einum 30 ára gomlum dana við fjúrtan døgum. Maðurin skal harafturat sita avbyrgdur allar fjúrtan dagarnar.

Maðurin, ið annars er fast búgvandi í Keypmannahavn, varð tikin 16. januar í danska høvuðsstaðnum og hevur sitið avbyrgdur síðani. Hann er síðani útflýggjaður føroysku løgregluni, tí maðurin hevur samband við hinar persónarnar, ið eru skuldsettir og dømdir í stóra narkomálinum.

Hósdagin kom eisini ein 27 ára gamal føroyingur fyri í Føroya Rætti, tí freistin fyri varðhaldsfongslingini var úti. Ákæruvaldið kravdi, at varðhaldsfongslingin verður longd, og at maðurin framvegis skal sita avbyrgdur.

Hann hevur sitið avbyrgdur síðan 16. januar. Hann góðtók ikki, at varðhaldsfongslingin varð longd uttan rættarfund. Rættarfundurin var ikki liðugur, tá blaðið fór til prentingar hósdagin eftir middag.

Tilsamans sita fimm mans í varðhaldinum fyri grov brot á rúsevnislógina. Teir eru allir avbyrgdir, so teir ikki kunnu ávirka møgulig vitni og málið sum heild.

Tríggir teirra vórðu handtiknir 16. januar. Ein teirra varð tikin 11. januar við 165 grammum av amfetamini. Tann fimti var í fyrsta lagi tikin 16. januar, varð síðani leyslatin aftur, men hesin hevði samband við málið og varð tí tikin innaftur.

# Norðuratlantsbólkurin til Føroya

**Teir tríggir fólkatingslimirnir í Norðuratlantsbólkinum koma til Føroya í vikuskiftinum at kunna føroyingar um arbeiðið hjá bólkinum.**

KUNNINGAFERÐ
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Sunnnukvøldið fáa føroyingar høvi at hoyra Norðuratlantsbólkin greiða frá samstarvinum í Fólkatinginum og ætlanunum, sum bólkurin hevur.

Norðuratlantsbólkurin kemur til Føroya í vikuskiftinum, og sunnukvøldið verður ein almennur fundur í Norðurlandahúsinum, har teir tríggir fólkatingslimirnir fara at greiða frá virkseminum hjá bólkinum.

Tað vóru Høgni Hoydal og nývaldu grønlendsku fólkatingslimirnir, Kuupik Kleist úr Inuit Ataqatigiit og Lars Emil Johansen úr Siumut, sum stovnaðu Norðuratlantsbólkin eftir fólkatingsvalið 20. november. Tórbjørn Jacobsen hevur nú loyst Høgna Hoydal av í Fólkatinginum, og umboðar Tjóðveldisflokkin í Norðuratlantsbólkinum.

Endamálið við at stovna bólkin var at standa sterkari í arbeiðinum í Fólkatinginum, og málið hjá bólkinum er at vinna Føroyum og Grønlandi økt sjálvstýri.

Bólkurin ætlar komandi tíðina at fáa altjóða serfrøðingar at kanna, hvørjar møguleikar Føroyar og Grønland hava fyri at fáa økt sjálvstýri og annars at varpa ljós á støðuna hjá Føroyum og Grønlandi.

Hesar ætlanir sleppa føroyingar at hoyra nærri um, tá ið bólkurin heldur kunningarfund sunnukvøldið og tíðindafund mánadagin í næstu viku.

Seinni í ár fara teir tríggir fólkatingslimirnir til Grønlands at greiða grønlendarum frá virkseminum hjá Norðuratlantsbólkinum.